# Tá tíggju minuttir skeiklaðu Kringvarpið



TÍÐARGREININ
*Róland í Skorini*

**Hví eru morgunlestrarnir ikki verdir at endursenda í útvarpinum? Hví er morgunfimleikur útvarpsins ikki verdur at senda? Róland í Skorini, studentaskúlalærari í religión og fronskum, endurskoðar í hesi grein avgerðina hjá Kringvarpinum um at skerja týdningarmiklar tættir í føroyskari útvarpssøgu**

Í 1987 skrivar Axel Tórgarð, prestur og fyrsti stjóri í Útvarpi Føroya, m.a. soleiðis í innganginum til bókina Morgunlestrar: Teir allarflestu av hesum lestrunum hava verið lisnir í útvarpinum. … Útvarpinum takki eg fyri loyvi til at prenta teir og útvarpsswtjóranum fyri at hava skrivað fororðið. Og tøkk fái Eyðun Winther og Janus Mohr fyri at hava lisið til rættis…. Tað er mín vón, at líka so væl sum teir vórðu móttiknir, tá ið teir vóru lisnir í útvarpinum, líka so væl verða hesir morgunlestrar móttiknir, nú teir verða útgivnir í bók".

Tað er týðiligt, at Axel kennir á sær, at hann við lestrunum í útvarpinum hevur mentanarligt, málsligt og andligt samband við fólkið. Tí er hann takksamur og vónríkur um, at lestrarnir ikki bara vóru verdir at skriva, senda og endursenda, men eisini at prenta og geva Føroya fólki í bók. Eisini sæst, at útvarpið samstarvaði og gjørdi sær stóran ómak at rættlesa, tí lesturin var ein háttur at fjálga um mál og mentan.

Er vón Axels nú brostin? Eru morgunlestrarnir ikki longur so frægt sum verdir at endursenda? Tá millum 70 og 80% av Føroya fólki ynskja endursending av morgunlestrinum aftur á skránna, er vón og virðing fólksins ikki brostin. Men hvør lurtar eftir demokratisku røddini?

**Vert at endursenda**

Ein meginregla í øllum almennum fjølmiðlum er, at tað, sum er vert at senda, er eisini vert at endursenda. Ein onnur meginregla er, at tað, sum er vert at senda, má sendast minst tvær ella tríggjar ferðir, tí vit hava ikki øll stundir at lurta í senn. Vit hava jú trískiftisvakt í arbeiðslívinum.

Um tað er ein skylda at senda lesturin kl. 07 á morgni, er tað sanniliga eisini ein samfelagslig skylda at endursenda hann eina ella tvær ferðir. Hetta átti at verið høvuðsreglan fyri allar sendingar, sum eru verdar at senda, og sum ikki bara eru løtuupplivingar sum t.d. ein fótbóltsdystur.

**Lestrar- og sálmaarvurin**

Í fororðunum til somu nevndu bók skrivar Niels Juel Arge, annar stjóri útvarpsins í mong ár, m.a.: "Eg gevi útgávuni mítt besta viðmæli…. Tað er Axel fyri at takka, at morgunlesturin varð tikin upp á útvarpsskránna, og hann fór sjálvur undir at skriva teir og hevur hildið á til henda dag.

Meðan Axel hevur skrivað, hevur Ú.F. savnað sangupptøkur av allari sálmabókini, og soleiðis hevur gingið hond í hond at gera lurtararnar kunnugar við øll sálmaløgini í okkara ungu sálmabók.

Axel hevur brotið upp úr nýggjum, og mong eru tey, sum hava ynskt sær at átt hansara morgunlestrar".

Vit síggja, at í hugaheimi Niels Juels hevði Útvarp Føroya eisini eina upplýsandi og pedagogiska uppgávu á mentanarliga økinum við tí endamáli at stimbra og varðveita lestur, sang, sálmar og sálmaløg. Vit ynskja tí Kringvarpinum tillukku við tiltakinum at syngja sálmar av nýggjum og gleða okkum at hoyra teir eisini í endursending av morgunlestrunum. Og hví ikki taka nýggjar sálmar uppí við nýggjum upptøkum bæði við kirkjuliðum, kórum, orkestrum og einstaklingum?

Er ikki longur vert at skriva nýggjar lestrar? Er ikki longur vert at gera nýggjar sálmaupptøkur? Er ikki longur vert at savna nýggjar sálmar við nýggjum løgum til komandi ættarlið? Hvat sá Axel, tá hann breyt upp úr nýggjum og fekk morgunlesturin á útvarpsskránna?

> » Tá millum 70 og 80% av Føroya fólki ynskja endursending av morgunlestrinum aftur á skránna, er vón og virðing fólksins ikki brostin. Men hvør lurtar eftir demokratisku røddini? «

Hann kendi á sær, at hann mátti geva einum aldargomlum, men samstundis modernaðum, meditativum og fólksligum skatti viðurkenning í almenna rúminum saman við so mongum øðrum almennum tættum. Tað kundi ikki gerast uttan við virðing fyri ymisku arbeiðstíðum og lurtimøguleikum skattgjaldarans. Tí mátti lesturin eisini endursendast. Skuldi onkur ikki havt stundir um morgunin, so leggur humoristiski Axel afturat: "Morgunlestrarnir kunnu eisini lesast um kvøldið". At finna stundir á skrá útvarpsins var fyri honum ongin trupulleiki.

**Morgunlesturin fjálgar um mál og mentan**

Sambært § 10 í kringvarpslógini skal Kringvarpið í programmvirkseminum leggja dent á fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

*Lestur er eitt serligt tekstaslag, sum lýkur ávísar treytir:*
Lesturin tekur støði í stuttum klassiskum tekstbroti, oftast úr Halgubók, sálmi ella einum av kristnu kirkjufedrunum ella heimspekingunum. Lesturin er stuttur í mun til prædikuna. Lesturin er tíðaraktuellur samsvarandi tíðaruppliving, árstíð, høgtíð ella øðrum viðkomandi høvi. Lesturin hevur altíð aktuelt, persónligt, eksistentielt innihald um t.d. frið, kærleika, rættvísi, náði, troyst, dirvi, vón, lívsmeining ella lívsendamál. Teksturin verður skrivaður og borin fram sum reflektión og meditatión, sum so verða stuðlað av sálmasangi og bøn. Í veruleikanum er lesturin ein neyv, stutt samanseting av fleiri tekstasløgum. Tí er málburðurin eisini neyvur og umhugsaður bæði málsliga, etiskt og filosofiskt.

Lesturin stuðlar eisini á serstakan hátt endamálinum í grein 10. Morgunlestrarnir hava vanliga - um ikki altíð - bæði teologiska og málsliga dygd, sum vit eisini kunnu brúka í undirvísingarhøpi. Nógvir kunnu eisini, sum hjá Axel, setast á prent. Ofta verða stuttar, men sera tíðarhóskandi teologiskar greiningar gjørdar í lestrinum. Eisini eru viðkomandi sitat av navnframum gudfrøðingum, heimspekingum, yrkjarum og rithøvundum javnan at hoyra. Harumframt er sálarfrøðilig greining ofta tikin við, sum hevur terapeutiskan týdning í góðari sálarrøkt. Alt fyri at fjálga um mál og mentan.

**Morgunfimleikurin hvarv í rørsluárinum**

Útvarp Føroya hevði bæði við morgunlestri og morgunfimleiki interaktivt samband við lurtararnar. Fyrra sendingin kravdi frið, djúphugsan, umhugsni, meditatión og bøn, og tann seinna kravdi rørslu, styrki, møði og fimi. Frálíkar, fjølbroyttar og samfelagsliga neyðugar sendingar, og hóskandi til rørsluárið og strongdartíðir.

Men hvat hendir? Styrkjandi interaktiva sambandið við okkum lurtarar verður kvett. Eg kann siga, at útvarpið tríggjar ferðir hevur hjálpt mær munandi burtur úr leguvaldi, tá eg havi ligið sundurbrotin og rygglamin í nógvar mánaðir. Tað var við spenningi og lívsvón, at eg ógvuliga veikur byrjaði at venja á sjúkrastovuni á Landssjúkrahúsinum bæði andliga við morgunlestrinum og likamliga við dagliga morgunfimleikinum um tíggju-tíðina á morgni. Eg upplivdi, at eg ímóti egnari væntan fekk nýggja lívsmegi. Útvarpsins dagligi íblástur var eggjandi og stimbrandi og passaliga stuttur og tíðarhóskandi tað sváru tíðina. Kortini var nóg mikið av tíð til allar hinar sendingarnar eisini. Útvarpsins leiklutur stuðlaði tí, sum kønu fysioterapeutarnir løgdu dent á.

**Sjónvarpslestur við avsporandi myndum**

At leggja endursendingina av morgunlestrinum á sjónvarpsskígjan er eitt dupult mistak. Tað er oftast ómøguligt at hava sjónvarpsskíggja tøkan í sjúkrasongini, á útróðri, á dekkinum, í haganum, í stiganum, á takinum, í bilinum, á verkstaðnum, í kjallaranum o.s.fr. Eydnast so hendinga ferð at sita við ein skíggja fyrrapart, verður kjarnuboðskapurin í lestrinum avsporaður av mótvirkandi myndum, sum ørkymla, t.d. tá boðskapurin er um frið, náði, vón ella fyrigeving. Sama tilvildarliga røð av myndum verður víst hvørja ferð við ongum samsvari við boðskapin, ein hurlivasi av myndum: menniskjað verður rikið úr Eden, Ábraham ofrar Ísak, Djevulin freistar Kristus, Jesus hoknar undir krossinum, nýføðingurin í fangi Mariu, Dánjal í leyvubølinum og Móses við lógartalvunum. Og so at enda, saman við Faðir Vár, smildrar Samson templið og mannakroppar sleingjast íkring.

Í dogmatikkini, trúarlæruni, verða náði og fyrigeving altíð kunngjørd, eftir at lógin hevur framt sína uppgávu. Í myndarøðini er tað øvugt.

Samson hevur nú fleiri hundrað ferðir á skíggjanum smildrað tempul Dagons í Gaza. Hvat man teoretiska og journalistiska ástøðið vera í hesum føri? Heilin er í uppreistri og tvíningum av meiningsleysum mótsetningum millum skíggja og tekst. Boðskapurin, sum hoyrist í oyrunum og myndin, sum sæst við eygunum, tykjast í skundi og óumhugsað at vera sett saman sum neyðloysn. Hví ikki eisini brúka ta ørgrynni av myndum við andligum íblástri ella náttúrumyndir, sum nútíðar listarmenn hava málað bæði í Føroyum og uttanlands.

**Lestur er sálarrøkt**

Religiónssosiologiskt hava granskarar staðfest ein vaksandi áhuga og tørv á andakt, lestri, meditatión, djúphugsan, pílagrímsferðum, andaligari røkt o.s.fr. í samfelagnum. Tað kemst m.a. av strongd, skundi, rótloysi og tómleika í einum ovurmaterialistiskum samfelagi. Mong leita sær hjálp hjá sálarfrøðingum og prestum, sum jú hava serstaka pastorala útbúgving. Og tá nú teologarnir, sum eru útbúnir gudfrøðingar og sálarhirðar, bjóða sær at skriva morgunlestrar, átti útvarpið sjálvandi at tikið av og brúkt henda møguleika at varðveitt eitt fjølbroyttari tilboð til ein nógv størri part av fólkinum enn bert tey, sum hava stundir og møguleika kl.07 á morgni. So at siga allir føroyingar verða doyptir, navngivnir, konfirmeraðir, giftir og grivnir frá onkrari kirkju ella samkomu. Tí er lesturin við endursending í almenna rúminum nakrar fáar minuttir í góðum samsvari við ynski hjá heilt nógvum føroyingum.

**10 minuttir av uppibornari sendítíð**

Fyrst er at undrast á, at útvarpið hevði ráð at taka minuttirnar frá lestrinum og fimleikinum, tí spurningurin bleiv jú beinanvegin, hvat skuldi fyllast í tómrúmið. Í tíðarrúminum frá kl. 07 á morgni og fram til kl. 12.20 er nógv áhuga-vert at hoyra, men samstundis eisini so nógv tómgongd og ífylla av tónleiki, at spurningurin ikki kann vera um plásstrot, enn minni at nøkur heild verður órógvað. Er ikki pláss fyri morgunlestri og morgunfimleiki við endursending, tá útvarpið ræður yvir 1440 minutt-um um samdøgrið? Morgunlestur og morgunfimleikur hóska væl inn í morgunheildina bæði at senda og endursenda. Ikki at endursenda morgunlesturin seinni á morgni er vanvirðing av øllum teimum, sum ikki hava tíð ella ikki megna at vera so tíðliga á fótum. At taka interaktivu fimleikasendingina av skránni er eisini at gloyma øll tey ungu og eldru, sjúku og skerdu, sum í mong ár hvønn dag hava leitað sær heilsu og betri førleika við at venja eftir vegleiðing og ráðum útvarpsins. At nøkur fara av og onnur koma á flatuna í almennum útvarpi er júst, sum tað eigur at vera, tí tað endurspeglar og fremur fjølbroytni. Ment útvarp og sjónvarp skal júst leggja seg eftir at eggja so mongum ymiskum samfelagsbólkum at koma á og fara av sendiflatuni so ofta sum møguligt. Annars verður miðilin alt ov einstáttaður og einsporaður í mun til fjølbroytta samfelagið. Lat teir privatu miðlarnar vera einstáttaðar og dyrka síni serøki og sínar serflokkar!

**Kringvarpið endurspeglar virðini**

Vit eru kringvarpinum takksom fyri eina fjølbroytta skrá, sum umboðar eina stóra mongd av fólkinum vinnuliga, mentanarliga, átrúnaðarliga, ítróttarliga, politiskt o.s.fr. Tá nú 70 - 80% av fólkinum sambært kanning hjá Fynd fegin vilja hava morgunlesturin endursendan sum fyrr, so er hetta í veruleikanum ein stór álitisváttan og heiður fyri útvarpið. Hetta vísir, at Útvarp Føroya hevur verið á rættari leið, og at útvarpið hevur megnað at hildið fast við siðbundnar sendingar, samstundis sum brotið er upp úr nýggjum á so mongum økjum. Útvarpið hevði við at endursent morgunlesturin og við at tikið morgunfimleikin uppaftur víst eina sterkari heildarfatan av føroyska samfelagnum og hevði samstundis sýnt størri etiska ábyrgd við at skapa størri almenna nyttu og gagn.

Javnvágin millum teir føstu, berandi, siðbundnu tættirnar og teir broytiligu, skiftandi og nýskapandi tættirnar gevur røttu gróðrarlíkindini. Hesir partar liva so at siga hvør av øðrum. Teir bjóða hvør øðrum av. Javnvágin ger, at Kringvarpið betur megnar at halda fast við kjarnuvirði so sum fjølbroytni, dygd og alment gagn bæði hjá frískum og sjúkum, ungum og gomlum.

> » Ein meginregla í øllum almennum fjølmiðlum er, at tað, sum er vert at senda, er eisini vert at endursenda «

Tíðargreinin